


*»We are the Champion« Hóast tað neyvan mundi hoyrast millum teir mongu áskoðararnar, so skrálaðu leikararnir av lívsins kreftum, tá gleðin um enn eitt gullmerki skuldi blásast út*

# Gullveitsla

Og so var tíðin komin, tá meistaraheitið skuldi feirast. Bæði viðhaldsfólk, leikarar og leiðarar tustu inn á vøllin, tá Suni Johansen hevði blást í floytuna fyri seinastu ferð.

Kenslurnar fingu frítt at fara í og kring HB-húsið, og ivaleyst vóru nakrir arbeiðsgevarar, sum saknaðu okkurt starvsfólkið mánamorgunin. Men um arbeiðsgevarin hoyrdi til reyð/svarta partin av høvuðsstaðnum, soleiðis sum tey á myndunum gera, so mundi tað tó ikki viðføra tann heilt stóra valsin kortini.

Jan Müller og Álvur Haraldsen vóru mitt í rokanum, tá gullið varð staðfest, og so lata vit myndirnar siga restina av søguni.

**- jm**




*Sum formaður í HB-stuðlum hevur Sólbjørn Thomsen enn bara roynt at fáa gullmerki, so alt bendir á, at hann eisini verður afturvaldur á komandi aðalfundinum*






*Takk fyri dystin. Liðleiðarin hjá HB, Sigurð Hansen, gav hvørjum einstøkum leikara eitt ordans klemm. Her er tað Rógvi Jacobsen, sum verður kroystur, og sjálvur tykist hann heldur ikki spara upp á kreftirnar*



*Tveir rættir HB'arar. Tað munnu vera fáir dystir í Gundadali, har Oskar og Øssur ikki hava staðið millum mest trúføstu áskoðararnar*



*Poul Michelsen er kanska ikki aktivur á besta mansliðnum hjá HB longur, men spenningurin var stórur fyri tað. Her fegnast hann saman við formanninum í HB, Birgir Enghamar*

